# Hvat gera heilsurøktarar?

- arbeiða heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi
- veita heilsu- og sjúkrarøkt
- eygleiða, útinna, vegleiða og eftirmeta
- geva heilivág við fullari ábyrgd
- stuðla og vegleiða avvarðandi
- stuðla fólki í at klára seg sjálvi sum longst
- hjálpa við at skapa innihald í gerandisdegnum
- stuðla fólki í at vera so virkin sum gjørligt, soleiðis at allir førleikar og sansir verða varðveittir sum longst
- arbeiða tvørfakligt. Opinleiki er lyklaorðið í øllum samstarvi
- stuðla fólki í dagligu lívsførsluni

# Hvar starvast heilsurøktarar?

- á sjúkrahúsdeildum
- á sálardeildum
- á ellis- og røktarheimum og heimum fyri minnisveik
- á eldrasambýlum
- í dagtilhaldum/virkisstovum
- í heimarøktini
- á bústovnum/sambýlum fyri sálarsjúk
- á bústovnum/sambýlum fyri fólk við menningartarni
- á viðgerðarstovnum
- sum stuðlar í heimum, stovnum og skúlum



# Hvat er heilsurøktaraútbúgvingin?

Útbúgvingin til heilsurøktara varir 22 mánaðir. Hon fevnir millum annað um psykiatri, somatikk, pedagogikk, rehabilitering, samfelagslæru, heilsu- og sjúkrarøkt, fyribyrging og heilivágslæru.

Heilsurøktarar arbeiða sjálvstøðugt og í samstarvi við aðrar starvsfólkabólkar við røkt, sjúkrarøkt, fyribyrging av sjúkum og eftirsjúkum, endurvenjing og aktivering.

Heilsurøktaraútbúgvingin gevur eisini atgongd til fleiri hægri útbúgvingar. Heilsurøktarar kunnu útbúgva seg víðari til millum annað ljósmóðir, fysioterapeut, ergoterapeut, sosialráðgeva, sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing.

# Hvussu blívi eg heilsurøktari?

Upptøka til heilsurøktaraútbúgvingina er treytað av, at umsøkjari hevur:

1. lokið heilsuhjálparaútbúgvingina, ella
2. viðkomandi útbúgvingar- og starvsroyndir, sum hava vart í minsta lagi 15 mánaðir.

Heilsuútbúgvingarnar eru skiftisútbúgvingar. Tað merkir, at skift verður ímillum skúlagongd og starvsvenjing.